## Viðmerking:

# Søgan um lægsta boð, sum gjørdist næstlægst

**Tíðindaskriv frá P/F Byggitek, ið hevði lægsta boð í sambandi við vegagerð v.m. til Vágatunnilin.**
Undiritaði hevur lítlan hug at skriva hesa frágreiðing, tí ikki er tað vanligt og enn minni skuldi tað verið neyðugt at skriva frágreiðingar til fjølmiðlarnar um eitt mál, sum eigur bæði lóg, siðvenju og fastar mannagongdir at ganga eftir. Tá ið henda frágreiðing kortini verður send fjølmiðlum og øðrum, so er tað í teirri vón, at fjølmiðlar, fólk við áhuga fyri tílíkum málum og ikki minst okkara kosnu politikarar kunnu gera sína egnu metingar um rættlætið hjá P/F Vágatunnilinum, sum okkara fólkaræði hevur litið upp í hendur at umsita 160 mio. kr. á fullgóðan hátt.

Sum kunnugt vórðu boðini at gera vegir og brúgvar báðumegin tunnilsmunnarnar latin upp á Hotel Hafnia tann 18. mai 2000, og boðini hjá teimum 7 byggifyritøkunum, sum vóru innbodnar at bjóða, sóðu soleiðis út. Viðmerkjast skal, at boðini vóru sett saman av trimum arbeiðum, og í yvirlitinum eru boðini samanløgd:

1. P/F Byggitek
   kr. 21.684.852,00
2. P/F J&K Petersen
   kr. 23.300.000,00
3. Sp/F JHR entreprenørar
   kr. 29.590.377,00
4. P/F á Heygnum
   kr. 29.990.216,00
5. Byggisamtøkan HON
   kr. 30.380.163,00
6. Sp/F Kanjon
   kr. 37.457.690,00
7. P/F Guttesen&Staksberg
   kr. 10.491.310,00 (bara brúgvin á Streymoy)

Her var lítið at ivast í, og nú høvdu vit væntað sum lægstbjóðandi at fingið fundarboð frá Landsverkfrøðingsstovninum, sum hevði sent okkum útbjóðingartilfarið og er byggiharraumboð og eftirlit hjá P/F Vágatunnilinum.

**Fyrsta fyriboðan**
Tann 18. mai var ein hósdag, og høvdu vit rokna við at hoyrt rættiliga skjótt frá byggiharraumboðnum um at koma til fundar at gera sáttmála um umrødda arbeiði. Fyrsti illgrunin um, at eitthvørt ikki var rætt fatt kom mánadagin 22. mai, tá ið arbeiðsformaður okkara greiddi frá, at hann sama dag hevði fingið tilboð frá einum leiðandi medarbeiðara hjá J&K Petersen um at gerast maskinførari í teirra nýggju maskinu, tí J&K Petersen fór at fáa arbeiðið við at gera vegir og brúgvar í sambandi við Vágatunnilin. Eg valdi at skúgva hesum til viks sum skemt.

**Næsta fyriboðan**
Næsta "fyriboðan" kom viku seinni, tá ið vit frættu frá donskum maskinsølufólkum, at J&K Petersen var í ferð at keypa maskinur til tunnilsvegagerðina, tí hesir søgdu seg at hava fingið hetta arbeiði at gera. Hetta byrjaði so smátt at órógva okkum eisini tí, at tíðin var farin at líða, og vit settu okkum tí í samband við stjóran P/F Vágatunnilinum tann 29. mai. Í telefonsamrøðuni greiddi Dávid Reinert Hansen frá, at nevndin í P/F Vágatunnilinum hevði avgjørt, at samráðast skuldi við J&K Petersen, og at avgerðin var tikin út frá eini sokallaðari heildarmeting. Ikki var var gjørligt at fáa stjóran at greiða nærri frá, hvat lá undir hesi heildarmeting.

Sama dag sendu vit P/F Vágatunnilinum skriv, har vit fýltust at mannagongdini — og serliga tí at vit um sama mundið fingu upplýst, at báðir ráðgevandi stovnarnir hjá Vágatunnilinum (P/F Landsbyggifelagið og Landsverkfrøðingsstovnurin) høvdu tilmælt til at taka av boðnum hjá okkum.

**Heildarmeting?**
Vit vóru nú ógvuliga ørkymlaðir av støðuni, tí givið var, at henda heildarmetingin mátti byggja á sera álvarsom viðurskifti, tá ið so gomul og føst siðvenja varð blakað á bláman.

Vit royndu at gita, hvør orsøkin var, tí bara teknisk ella fíggjarlig viðurskifti kundu grunda so løgnan atburð. Hinvegin — bara tað at vera útvaldur saman við øðrum 6 byggifyritøkuum at bjóða var í sjálvum sær ein "góðskugóðkenning", soleiðis at ein í forhond varð mettur at megna uppgávuna bæði tekniskt og fíggjarliga. Trupult var at fáa eyga á aðrar forðingar, sum kundu avdúka atburð P/F Vágatunnilsins.

Áðrenn grundgevingin undir heildarmetingini kom Fyri okkum var tað altavgerandi at finna orsøkina til hesa heildarmeting, tí henda hevði verið orsøk til, at vit ikki kundu koma upp á tal, hóast vit høvdu lægsta tilboðið og vóru av fakkunnleikanum innstillaðir at fáa arbeiðið — fakkunnleiki, sum hevur 40-50 ára royndir at meta um tílík viðurskifti. P/F Vágatunnilin hevur fakkunnleika í einum stjóra, ið ikki hevur serligar drúgvar royndir umframt nevndarlimum, sum eru: Klæmint Weihe, nevndarformaður (stjóri í SEV), Bergur í Garði, næstformaður (postverksstjóri), Jens Kári Vilhelm (stjóri í Framtaksgrunninum), Dávid Reinert Hansen (stjóri í P/F Vágatunnilinum) og Heri Hammer (býarverkfrøðingur í Klaksvík). Um nevndin hevur tikið avgerðina fullmannað, eru eingir upplýsingar.

Lat tað vera sagt beinanvegin, at tað er ikki vanligt, at byggiharrin setur metingar og tilmæli hjá ráðgevarunum til viks, tí ivi verður tá reistur um førleikan hjá ráðgevunum. Lesarin kann so sjálvur meta um metingarførið hjá ávikavist P/F Landsbyggifelagnum og Landsverkfrøðingsstovninum øðrumegin og P/F Vágatunnilinum hinumegin.

Tíðin gekk og eingin grundgeving kom fram í ljósmála, men tíðindi vóru farin at ganga.
Eftir at fjølmiðlar og onnur vóru farin at hava áhuga fyri málinum, hoyrdist nevndarformaðurin í P/F Vágatunnnilinum siga í viðtali í ÚF, at J&K Petersen bert vóru kr. 600.000,- hægri enn vit, um øll alternativ vórðu tikin við. Ikki fyrrenn landsstýrismaðurin í vinnumálum kravdi eina frágreiðing frá P/F Vágatunnilinum, fekst greiði á nøkrum viðurskiftum.

**Grundgevingin kom, og lægsta boð gjørdist næst lægst**
P/F Vágatunnilin mátti senda Vinnumálastýrinum eina frágreiðing. Vit hava ikki fingið avrit, og máttu vit nýta lógina um alment innlit til tess at fáa frágreiðingina hjá Vágatunnilinum um grundgevingarnar fyri heildarmetingini um at forfjóna okkum. Nú vóru vit komin til 7. juni.

Eftir grundgevingini at døma eru hesi viðurskifti generelt sæð grundarlagið hjá Vágatunnilinum, og sum tað verður sagt í frágreiðingini "Til tess at meta um, hvat boð er til mestan fyrimun fyri felagið", verða boðini mett út frá:

- Samsvar við ætlan fyri útbjóðing
- Prísi
- Alternativum og reguleringum
- Tekniskum viðurskiftum, so sum uppskot til arbeiðsætlan og amboð
- Skipan av arbeiðinum, leiðslu og manning
- Fíggjarligum umstøðum

**Samanum tikið vildi P/F Vágatunnilin nú vera við:**
14) at P/F J&K Petersen var vorðið kr. 300.000,- bíligari enn vit !
15) at sami hevði størri tekniska leiðslu og fíggjarliga orku og tí
16) mettir kunna gera arbeiðið liðugt til tíðina

Eg skal ikki plága lesaran við smálutum, men stutt viðmerkja, at roknistykkið hjá Vágatunnilinum tykist føra til, at verður roknað nóg leingi, kann umrødda arbeiðið gerast ókeypis.

Viðvíkjandi tekniskari og fíggjarligari orku og hetta at gera arbeiðið liðugt til tíðina er einans at viðmerkja, at hesi viðurskifti eru mett í sambandi við, at vit vórðu innbodnir at bjóða, og at tveir sera royndir stovnar hava tilmælt, at vit skulu gera arbeiðið.

**Málsviðgerðin higartil.**
Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur álagt P/F Vágatunnilinum at tingast við okkum sum havandi lægsta tilboð. Fundur var avtalaður tann 9. juni, men varð avlýstur, tí stjórin í P/F Vágatunnilin bar seg undan, orsakað av banninum, sum Føroya Handverksmeistarafelag hevði lýst tann 31. mai. Okkum kunnugt varð bannið einans lýst navngivnum fyritøkum, sum bjóðaðu ! Avtalað varð síðan, at nýggjur fundur skuldi verða tann 14. juni, men boð komu stutt eftir, at Dávid Reinert Hansen verður burturstaddur alla vikuna (vika 24), og eingin nýggjur fundur er avtalaður.
P/F Vágatunnlinum tykist ikki hava skund.
Vit hava ikki enn mist vónina um, at P/F Vágatunnilin ber seg at sum allir aðrir byggiharrar og tekur upp tingingar við lægstbjóðandi og tekur tey mál upp á fundi við okkum, sum eiga at verða viðgjørd millum okkum og teir og ongan annan — og ikki í fjølmiðlum og allar aðrar óviðkomandi staðir. Hevði hetta byggimál verið viðgjørd eftir vanligum leisti, høvdu vit fyri langari tíð síðan verið bodnir til fundar um sáttmála at gera arbeiðið. Til lesarans upplýsing skal nevnast, at bara lægstbjóðandi kann lækka sítt tilboð enn meir. Hetta kunnu hinir bjóðararnir ikki gera sambært lógina um útbjóðing (licitatión). Tað má standa flestu fólkum greitt, at tað hevði verið skilabetri at fingið tílíkt burtur úr, enn at fara undir kryptiskar og kanska ólógligar lækkingar av næstlægsta tilboðið og so í seinasta enda rokna við einum millióna-endurgjaldskravi frá okkum omaní. Telur tað heldur ikki við, at vit eru samstarvsfelagar hjá NCC Vágakonsortiet, ið hevur lægsta tilboðið til sjálvt borarbeiðið?

**Niðurstøða**
Hetta er sum at vera boðin í brúdleyp sum verdugur gestur og so verða hunddálkaður, uttan at nakar rættir hond frá síðu at steðga hesum. Betur hevði sømt seg brúðarparinum ikki at boðið okkum í hetta brúdleyp.

Hvussu hetta brúdleyp fer at enda er ilt at siga, men sum náttin líður ber veitslan brá av gølu, men enn ber brúðarparinum og teirra avvarðandi til at bjarga brúdleypinum frá at enda í skomm og gølu, sum leingi fer at verða havt á munni.

**Tórshavn, hin 12. juni 2000**
**Vegna P/F Byggitek**
**Tummas Sørensen, stjóri**





DELL Dimension XPS T600R

Intel Pentium III 600MHZ
Intel 440BX chipset 100MHz FSB
128 MB SDRAM PC-100, 512kb cache
15GB IDE harðdisk (5400RPM)
17" Dell, TCO99, litskermur
56K V.90 Modem Data/Fax
12XDVD ROM - software emulering
nVIDIA 32MB TNT2 M64 AGP
Creative SoundBlaster 64 Voice ljóðkort
Altec Lansing ACS-340 við Subwoofer
Dell 105-Key Slimline knappaborð
Microsoft IntelliMouse
Ms. WorksSuite 2000
Ms. Windows 98 DK
3 ára garanti

15.990,- v/ mvg

FÍGGING KANN ÚTVEGAST

DELL Dimension L500C

DELL Dimension L500C
500MHz Intel Celeron Processor
Intel 810e chipset
Integr. 4MB Intel 3D AGP Grafik
64 MB SDRAM
Dell 17" TCO-99 skermur
15GB IDE Harddiskur (5400RPM)
12XDVD-ROM, Zone 2, software emulering
Creative SoundBlaster 64 Voice
Harman Kardon hátalarar
3.5" 1.44MB FloppyDrev
105-Key Slimline tastatur
Logitech 3 knappa mús
V.90 Data/Fax K56 PCI modem
MS Works Suite 2000
MS Windows 98
3 ára garanti

11.975,- v/ mvg

FÍGGING KANN ÚTVEGAST

FARODANE
WWW.FARODANE.FO
Brekkutún 4 - 188 Hoyvík
tlf. 311414 - fax 317534
- vitjið eisini nethandil okkara eKEYP




# Føroysk list á netinum

*Nú hava 3 føroyskir teldufrøðingar, við alski til føroyska list, tikið seg saman um eitt gallarí á alnetinum. Ein sølumiðstøð uttan landamark. Samráðingar hava verið við 10 føroysk listafólk, løgfrøðingar og onnur, og brátt kann føroysk list keypast á netinum frá FarArts*

Dagfinn Olsen

Nú hava 3 føroyskir telduráðgevar í Danmark tikið seg saman um eitt gallarí á alnetinum. Eitt gallarí, ið hevur føroyska list at bjóða.

Undir heitinum FarArts er ætlanin at bjóða og marknaðarføra føroyska list. www.fararts.com kann væntandi vitjast longu um hálvan juni ella har á leið, men sølan byrjar væntandi ikki fyrr enn í juli. Heimstaðið á netinum keyptu teir í 1999.

Teir tríggir, ið bjóða seg fram sum gallaríeigarar á netinum, eru Bogi K. Mouritsen, Bjarni Johansen og Christian Didriksen Grahn. Teir starvast allir sum telduráðgevar í Danmark, men hava umframt hetta eisini alskin til føroyska list felags.

Um vikuskiftið hevur Bogi K. Mouritsen verið í Føroyum og samráðst við listafólk og løgfrøðingar og tað byrjar at koma á pláss, sigur hann.

Fararts er eitt smápartafelag, sum teir 3 teldufrøðingarnir eiga í felag og hava frammíhjá. Teir vænta ikki stóra sølu beinanvegin, men vóna tó ikki at vera fyri fíggjarligum smeiti. Og hóast talan er um ítriv hjá trimum monnum í føstum starvi, so er talan um eitt felag, ið sjálvsagt helst skal bera seg. Í byrjanini verður talan um fastar prísir, men seinni verður møguliga talan um uppboðsølu.

Teir valt sær 10 føroysk listafólk at samráðast við. Tey 10, sum eru við í ætlanini eru Amariel Norðoy, Hansina Iversen, Edward Fuglø, Kári Svensson, Eyðun av Reyni, Rannvá Kunoy, Astrid Luhin, Sigrun Niclasen, Olivur við Neyst og Zacharias Heinesen.

Tað serstaka við hesi ætlan er, at føroysk list nú verður á sølustað, ið ikki hevur nakað landamark. Hinvegin er heldur ikki talan um nakran veruligan – fysiskan – búðstað.

Bogi K. Mouritsen sigur, at hann veit ikki um annað gallarí, ið bert er á netinum. Onnur gallarí hava heimasíður, ið vísa, hvat tey hava at bjóða. Men talan er iki beinleiðis um gallarí og sølu on-line á netinum.

### Koyr í vognin

Trýstir ein seg inn á síðuna hjá FarArts, so kann ein velja seg víðari. Kinna Poulsen hevur skrivað søguliga grein um føroyska list og hon hevur eisini skrivað tað, ið vert er at vita um tey umboðaðu listafólkini. Aktuelly verkini eru eisini í føgrum litmyndum.

Allur tekstur er á føroyskum, donskum og enskum.

Søla á netinum er ikki nýggj, men tó er eitt og annað nýtt ella serstakt við FarArts. Mong gallarí eru ikki á netinum. Tað er víst. Talan er bert um frumverk (originalar), ið eru til sølu. Forritið, ið verður nýtt, er ment til endamálið.

Er tað so, at ein ger av at keypa, eftir at hava lisið um listafólk og sæð myndir av verkum, ið eru til sølu, so kann ein velja sær ein innkeypsvogn og fylgjast kann við, hvussu nógvan pening ein nýtir, alt eftir hvussu nógv ein koyrir í vognin. Gjørt verður upp í dollarum

Og sum heild kann sigast, at talan er um eina seriøsa ætlan á høgum støði. Sáttmálar eru við hvørt einstakt listafólk og tey hava eisini loyvi at selja til annan keypara, sum tað gerst aktuelt, at eitt verk, sum er til sølu hjá FarArts, verður umbiðið hjá listafólkinum sjálvum.

Goldið verður á netinum við korti. Eisini er ein hegnislig skipan, ið tryggjar at gjalding fer rætt fram og at alt er í lagið. Í løtuni verður arbeitt at fáa øll slík viðurskifti á pláss og at fáa góðkenning á røttu støðunum.

Avtala er eisini við Flogfelag Føroya. Tá keypt verður, verður kortið kannað. Flogfelagið fer út til listafólkið eftir verkinum, smíðar ein kassa, ið fær ávíst tracking nummar.

Á heimasíðuni hjá DLH (samstarvsfelgi hjá Flogfelagnum) kann ein so við tracking nummarinum fylgja verkinum. Bogi Mouritsen hevur sjálvur roynt slíka skipan, tá hann t.d. hevur keypt bók frá kenda netsølustaðnum Amazon. Sjálvt, tá pakkin flytur vørubil, fæst hetta at vita. Og kemur flytimaðuin á hurðina og eingin er inni, so verður hetta eisini skrivað og vart verður gjørt við tað. Soleiðis veit ein altíð hvar pakkin er, um tað so er ein keypari í New York, ið keypir frá listafólki í Føroyum.

### Til New York

Seinni í ár skulu fleiri av listafólkunum, ið eru umboðað hjá FarArts, til New York at stilla út.Tá ætla menninir aftanfyr FarArts sær við fyri at gera vart við seg. Bogi K. Mouritsen sigur, at vónandi gongur so mikið væl tá, at felagið kann gjalda fyri ferðina. Men, leggur hann brosandi afturat, at um ikki, so ætla teir 3 listafjeppararnir sær avstað hóast alt.

Fólk við áhuga fyri føroyskari list, listasøgu, ella bert fólk við vanligum forvitni, kunnu leita sær inn á www.fararts.com

Um mánaðarskiftið kemur væntandi rættulig gongd á og talan verður um eitt føroyskt gallarí uttan landamørk. Enn eitt boð um, at heimurin minkar og møguleikarnir vaksa. Esini hjá føroyskari list.



*Bogi K. Mouritsen er ein av monnunum aftanfyri FarArts, eitt gallarí á alnetinum. Um vikuskiftið hevur hann verið í Føroyum og samráðst við listaføolk og løgfrøðingar og væntandi verður klárt skjótt klárt at trýsta seg inn á eitt føroyskt gallarí uttan landamørk*

# Barnatrúgvin

*2. hvítusunnudag helt Jan Lindhardt, biskupur í Roskilde, gudstænastu í Vágs Kirkju. Hann fekk ikki innivist í Vesturkirkjuni í Havn, men hann metir ikki, at rákið sum er orsøk til slíka støðutakan, fer at fáa fótin fastan innan kirkjugátt*

Dagfinn Olsen

1000 ára haldið fyri kristnanini av Føroyum varð um vikuskiftið hildið við gudstænastum kring landið, har føroyskir prestar, Føroya bispur og danskir biskupar høvdu gudstænasturnar.

Sum miðlarnir farnu vikurnar hava gjørt burtur úr, so var tað ikki uttan hóvasták, at donsku biskuparnir vórðu bodnir hendaveg. Allir prestarnir vóru nevniliga ikki líka fegnir um vitjanina og at fáa biskuparnar í sínar kirkjur.

Í Vesturkirkjuni í Havn skuldi kendi danski biskupurin Jan Lindhardt halda gudstænastuna, men hetta varð av ongum og helt hann ístaðin gudstænastuna í Vági. Jan Lindhardt er ikki óroyndur í almennum kjaki og er kendur og høgt mettur fyrilestrahaldari.

Væl av fólki hevði leitað sær í kirkju í Vági at lurta eftir Jan Lindhardt. Vágsbygd hevur annars verið merkt av prestaloysi, síðani fyrst Heri Joensen fór í starv í Havn og seinni somuleiðis Elsa Funding.

Tað var tí forkunnugt og kærkomið hjá vágbingum at fáa Lindhardt til bygdina. Ein maður við orðinum í síni makt.

Lindhardt prædikaði um barnatrúnna og at halda fast við hana ella missa hana. Hann nýtti myndina, at trúgvin er eitt tilboð. Eins og kærleikin. Ein kann siga ja takk, ella verða gomul genta ella gamal drongur.

### Keddur av støðuni

Jan Lindhardt sigur annars í viðmerking til íkomnu støðuna, nú hann prædikaði í Vági og ikki í Havn, at hann er keddur av støðuni. Hann leggur tó dent á, at tað eisini er spennandi og positivt at koma uppliva tað at koma til Vágs ístaðin.

Hann dylir tó ikki, at hann metir vera heldur óhepnan og keðiligan hátt at útinna kristindóm, sum gjørt verður av ávísium í Føroyum, og sipar hann til, at biskupar ikki fáa innivist í ávísum kirkjum. Hann leggur tó afturat, at fyribrygdi, sum hetta, eisini eru í Danmark.

Jan Lindhardt metir tó ikki, at áskoðanir av slíkum slag fara at fáa fótin fastan inna kirkjugátt og hjá meiniga kirkjufólkinum.

Seinni í vikuni prenta vit ætlandi prædikuna, sum Jan Lindhardt helt í Vágs Kirkju 2. hvítusunnudag.

## Rætting

Í grein í blaðnum leygardagin hvurvu nøkur orð í 2. reglubroti í greinini um Trónd Patursson og ferð hansara í kjalarvørri Robinson Kruso.

Har skuldi standa, at »søgan er heimsgitin og varð givin børnum í Føroyum frá 10 ára aldri í 1914«.

Vit biða lesaran orsaka mistakið.

*- blðm -*




Hondgjørt prýði til føroyska búnan

Støkk inn á gólvið og síggj okkara stóra og góða úrvæl av hondgjørdum prýðislutum úr silvuri til føroyska búnan.







Eisini hava vit skógvaspennir, knappar, stimar og aðrar prýðislutir til føroyska búnan






Pf. Eilif Arge
Tel 455164, Klaksvík
Fa. Magnussen, ur & optik
Tel 373232 Vágur
Ur- og Brillustovan
Tel 447950, Runavík
Ursmiðjan
Tel 332024, Sørvágur

3arin
SMS · Tel. 353535 · Fax 353536
E-mail: tryarin@post.olivant.fo